Nr. 108/2019

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur viðvíkjandi endurskoðan av eldraøkinum, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Nær ætlar landsstýrismaðurin at seta gongd á arbeiðið við at eftirmeta eldraøkið saman við kommununum, soleiðis sum lógin um heimatænastu og eldrarøkt frá 2015 ásetir?
2. Hvussu ætlar landsstýrismaðurin at leggja hetta arbeiðið til rættis, soleiðis at eftirmetingin á ein skipaðan hátt greinar og lýsir allar viðkomandi tættir, grundað á tær royndir, sum eru gjørdar, síðani kommunurnar yvirtóku ábyrgdina av økinum?

Viðmerkingar:
Tá ið ábyrgdin fyri eldraøkinum var áløgd kommununum 1. januar 2015, varð ásett, at lógirnar, sum skipa eldraøkið, skuldu endurskoðast fimm ár eftir, at lógirnar vóru settar í gildi. Tað vil siga í 2020. Metast skal m.a. um, hvørt afturberingarleisturin er nøktandi, um markamótini millum kommunur og millum land og kommunur eru nóg greið, og um kommunalu samstørvini virka eftir ætlan, so tey eldru fáa nøktandi tænastur um alt landið.
Arbeiðið við nýggjari vælferðarlóg reisti eisini fleiri spurningar m.a. um avleiddan tørv á at gera broytingar í eldralógini.
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er beinleiðis ásett, at lóggávan skal endurskoðast í 2020. Og í serligu viðmerkingunum til hesa áseting stendur, at endurskoðanin skal fara fram í samstarvi við Kommunufelagið. Tí eiga broytingar í eldralógini fyrst og fremst at verða gjørdar í framhaldi av eini eftirmeting, har fakligi førleikin, innlitið og áhugamálini í kommununum eisini eru umboðað, og ikki sum einvís stig frá landsstýrinum.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 18. juni 2020

Heðin Mortesen